Dimmalætting

– ÁLÍTANDI TÍÐINDI

Týsdagur
Nr. 163 ● 120. árgangur
2. september 1997
Tlf. 11212 ● Fax 10941

kr. 7,00

Nýggj politistøð í Klaksvík

Við teirri nýggju Politistøðini í Klaksvík er endi fingin á einum kapittuli í søguni hjá politistunum í Føroyum. Allar støðirnar uttan tann í Havn hava fingið aðrar og munandi betri umstøður at arbeiða undir.

Heimatíðindi 5

Bogi vann 100 km fjórða árið á rað

Rógvi Johansen, sum hevði súkklað allan teinin saman við Boga Kristiansen, noyddist at síggja vinnaran seinastu trý árini súkkla spakuliga um málstrikuna og vinna gull fyri fjórðu ferð á rað, tí Rógvi fekk krampa.

Ítróttur 6

Stuttan frunt og myrkt smyrsl

Í skjótt eina viku hava frisørarnir frá fyritøkuni Wella, Carsten Hansen og Janni Sørensen, undirvíst og sýnt fram seinasta hármótan fyri føroyskum hárfriðkanarfólki. Carsten Hansen var eisini í Føroyum í fjør.

Heimatíðindi 3

Samdrigið, támut og regn av og á. 15-20 m/s av landsynningi. Hitin um 13 stig.

Fyrstu oljumilliónirnar endaðu í Hetlandi

Ongantíð áður hevur so nógv virksemi verið í føroyskum sjógvi í sambandi við oljuleitingar. Tá tað var sum mest, skutu fimm skip seismikk samstundis. Men tá manning skuldi skiftast og proviantur keypast, fóru skipini til Hetlands – bert tríggjar ferðir komu skip í føroyska havn.

GEORG L. PETERSEN

Tá tey fyrstu seismikkskipini komu í føroyskan sjógv fyri trimum árum síðani, komu tey nærum øll inn í føroyska havn. Skipini vórðu víst fram fyri almenninginum og politikarum. Tað var greitt, at stórar inntøkur vóru í væntu, tí tað kostar almikið at gera slík skip út við provianti og olju, eins og annað virksemi verður avleitt á staðnum, har skipið er.

Metingar innan vinnuna siga, at hvørja ferð eitt seismikkskip kemur í havn, leggur tað í meðal 1,3 miliónir krónur eftir seg. Skipini eru í umráðnum millum føroyskt og bretskt øki í einar fýra mánaðir, meðan veðrið er so nøkulunda gott.

Kemur hvørt skipið í Havn fýra ferðir at bunkra og skifta manning, leggja tey hvørt einar fimm milliónir krónur eftir seg, tað vil siga 30 milliónir krónur tilsamans.

Men tá veruliga virksemi kom í gongd í summar, hildu seismikkskipini seg burtur frá føroyskari havn. Bert tríggjar ferðir kom skip í føroyska havn. Leitingarfeløgini valdu ístaðin at brúka hetlendskar havnir.

– Hetta er ikki at skilja, tí feløgini hava verið nøgd við prísirnar í Føroyum, bæði hvat viðvíkur havnapengum, provianti og flutningi. Og teinurin at sigla til Hetlands ístaðin fyri til Føroyar frá kanningarøkinum er heldur ikki styttri, sigur ein innan vinnuna.

Fólk innan vinnuna skilja hetta ikki rættiliga, og fyri nøkur kom stóra talið av seismikkskipum undir Føroyum heilt óvart á.

Virksemið í ár var nevniliga ikki størri enn nakað undanfarið ár.

– Tað eru vit, sum skriva kanningarloyvini út. Tað er ikki vanligt aðrastaðni at leggja treytir við kanningarloyvi, so tað hava vit heldur ikki gjørt. Vit hava tó gjørt teimum greitt, at føroyskar fyritøkur skulu vera við, tá vaktarhald o.a. skal bjóðast út, sigur Martin Heinesen, leiðari á Oljufyrisitingini.

Digicon Geophysical hevur havt tvey skip í føroyskum sjógvi, Professor Karensov og Føhn. PGS Exploration hevur eisini havt tvey skip í føroyskum sjógvi, Malene Østervold og Geo Explorer. Geo Team hevur havt eitt skip, Geo Artic, í føroyskum sjógvi, og hetta skip hevur júst verið í føroyskari havn. Geco hevur eisini havt eitt skip í økinum, Polar Queen.

– Tað verður øðrvísi, tá veruligu oljuleitingarnar koma. Tá eiga feløgini sum útgangsstøði eisini tá olju, tey finna, og teimum kunnu vit seta krøv, og kunnu krevja, at alt virksemi gongur út frá Føroyum, sigur Martin Heinesen.

Diana prinsessa deyð í Fraklandi

Nýggjan studentaskúla

Í gjár var Føroya Studentaskúli 60 ár. Millum tær mongu gávur, ið rektarin Mads Andrias Winther tók ímóti á 60 ára stovningarhaldinum, vóru boðini um, at ein nýggjur studentaskúli skal byggjast.

Eilif Samuelsen, landsstýrismaður við skúlamálum, segði á samkomuni, at tað er skjótari at byggja ein nýggjan skúla enn at umvæla tann gamla.

– Vit hava tí í undirvísingarstýrinum tikið avgerð um at arbeiða fram ímóti at projektera og byggja ein nýggjan skúla ístaðin, segði Eilif Samuelsen.

Heimatíðindi, síða 4

Diana prinsessa av Wales doyði sunnunáttina í eini ferðsluvanlukku í París. Hon varð 36 ár.

EMIL L. JACOBSEN

Allur heimurin fekk ein skelk, tá boðini komu sunnumorgunin um, at Diana prinsessa av Wales hevði latið lív av eini ferðsluvanlukku í franska høvuðsstaðnum París.

Saman við unnusta sínum Dodi Al Fayed royndi Diana at sleppa undan teimum sonevndu »papparazzi«-myndatakarunum, sum høvdu elt tey í fleiri dagar.

Í einum tunnli undir Seine-ánni við eini rúgvu av motorsúkklum í hølunum rendi bilurin á ein betongstólpa við 160 km/t.

Al Fayed og førarin av bilinum doyðu báðir á staðnum, men ambulansafólk megnaði at fáa lív í aftur Dianu á vanlukkustaðnum.

Men tá hon kom á sjúkrahúsið, var hjartað hildið upp at við at sláa, og hóast læknarnir leingi royndu at fáa lív í aftur prinsessuna, var einki at gera, og klokkan 4.00 sunnunáttina varð hon lýst deyð.

Úr øllum pørtum av heiminum eru samkensluskriv komin til bretsku kongafamiljuna og serliga til teir báðar synirnar hjá henni og Charles krúnprinsi, 15 ára gamla William og 12 ára gamla Harry.

Millum annað segði suðurafrikanski forsetin Nelson Mandela:

– Diana prinsessa var ein sendiharri fyri offrini av landminum, sendiharri fyri foreldraleysu børnini í krígnum og fyri sjúkum og illa støddum kring allan heimin.

Og bretski forsætismálaráðharrin Tony Blair hevði hesi orð um prinsessuna:

– Alt okkara land syrgir. Diana var ein vøkur og kensluborin kvinna, ið dugdi við øllum menniskjum. Ikki bara í Bretlandi, men kring um í øllum heiminum, og hon verður mint sum ein vinur.

Eisini frá føroysku Løgmansskrivstovuni er samkensluskriv sent til Londons, har m.a. sagt verður, at Diana prinsessa var høgt í metum millum Føroya fólk, og at fólk sóu upp til hana fyri hennara arbeiði fyri tey sjúku og neyðstøddu um allan heimin.

Síðurnar 8 og 9

Diana prinsessa doyði klokkan 4.00 sunnunáttina

Mynd: Stephen Jaffe/REUTER

Tann svarti Mercedes-Benz bilurin hjá Dianu prinsessu og Dodi Al Fayed rendi við 160 km/t inn í eina betongsúlu, og Dodi Al Fayed og bilførarin doyðu á staðnum. Diana varð flutt á sjúkrahús, men doyði nakrar tímar seinni

Mynd: Charles Platiau/REUTER